3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

FRÓ›I LØKSÁGAR›

D A D



Everything Glows

Donsku D-A-D eru nú klárir vi› uppfylgjararanum til Simpatico. Everything Glows er fløgan sum skal tryggja at D-A-D ikki enda sum rokk-pensionistar. Simpatico útgávan frá 1997, og missurin av trummusláaranum vóru um at taka› lívi› av bólkinum, so teir hava nógv at prógva vi› hesi útgávuni.

Eftir drúgva tí› í upptøkuhølunum saman vi› producaranum Nick Foss og n‡ggja trummusláaranum Laust Sonne, er nú komi› á mál, og fløgan er send á markna›in. Tær ellivu skeringarnar á útgávuni bera bo› um ein bólk, sum hóast nógv ár á baki, framvegis hevur nógv uppá hjarta, og kann vera vi› til at halda lív í einum doyggjandi donskum rokkpalli

Fyrsta skering Everything Glows er ein sangur um ein av teimum døgunum tá alt gongur uppá stás og lívi› bara er vert at liva. Tá lurta ver›ur eftir útgávuni so ljó›ar ta› sum bólkurin hevur havt fleiri av hesum døgunum í upptøku-hølunum. Everything Glows er ein útgávu sum útstrálar eina ávísa gle›i tó uttan at ljó›a b‡ttislig og fjákut.

Persónliga haldi eg at serliga eitt lag sum The Road Below Me er eitt ta› best eydna›a lagi› á útgávuni hetta helst av nostaligskum grundum. Lagi› hevur rættuliga nógv av Bad Craziness og Sleeping My Day Away stemningi yvir sær, og ta› stutt sagt rokkar. Onnur løg sum eisini eru verd at nevna eru Suntstar, Summer Me Soon og A Kiss Between The Legs.

Í eini tí› har bólkar sum eitt nú Oasis rættuliga skuffa, og stórstu framtí›arvónirnir fyri rokktónleikin vera bygdar á eina komandi útgávu hjá Guns'N' Roses, naka› sum heilt sikkurt bara kann ganga gali›, er henda fløgan hjá D-A-D eitt ljóspunkt, sjálvt um hon kanska ikki heilt livir upp til tann tónleikin teir vóru kendir fyri at spæla fyri nøkrum árum sí›ani. Alt hevur tí› sína, og ta› hava D-A-D eisini sjálvt um vit skriva 2000. Herfrá far n‡ggja fløgan hjá D-A-D tey heitastu vi›mæli.

Methods of Mayhem

Methods Of Mayhem

Hartsláandi trummusláarin úr Mötley Crüe, Tommy Lee, er annar av høvu›smonnunum í n‡ggja amerikanska bólkinum Methods of Mayhem. Methods of Mayhem fylgja á síni fyrstu útgávu rá›andi tónlistarligu trendini, og blanda rapp og rokk.

Eftir at hava siti› handan trummurnar í Mötley Crüe í nógv ár, og sí›ani at hava siti› handan rimarnar í Los Angeles, fyri at hava buka› konu sína, Pamelu Anderson, er Tommy Lee nú at hoyra í n‡ggjum høpi. Ta› sum fyrr var reindyrka›ur glam rokkur saman vi› Mötley Crüe, er nú blivi› til hart rópandi rapp tónleik, krydda›ur vi› rokkguitarum og tilhoyrandi illsinnisrópum, í bólkinum Methods of Mayhem. Afturat sær í Methods of Mayhem hevur Tommy Lee ein rappara nevndur MiLo. Ta› sigst at vera hesi seinni sum eigur hei›urin fyri at útgávan bleiv til naka›, og ta› fyrst og fremst eru hansara visíonir sum eru drívmegin.

Sjálvnevnda fløgan hjá Methods of Mayhem tekur trá›in upp eftir nøvns um Kid Rock og Limp Bizkit, sum bæ›i eru umbo›a›i á útgávuni hjá Tommy Lee og teimum. Bæ›i Kid Rock sjálvur, og Fred Durst úr Limp Bizkit eru gestir. Ein rúgva av ø›rum gestum eru eisini at finna á hesi útgávuni. Mixmaster Mike úr Beastie Boys, Snoop Doggy Dog, Lil' Kim, og ikki minst gamla funk kempan George Clinton, umframt at elektronisku úrmælingarnar úr Crystal Method sum á lagnum Spun gera vart vi› seg.

Á tekstsí›uni hevur Tommy Lee havt úr at gera, og fleiri av tekstunum eru um persónlig vi›urskifti hjá honum, og eru um tí›ina handan rimar. Ta› skal tó ikki pástandast at talan er um or› sum fáa tankarnar hjá lurtaranum upp at reika. Methods of Mayhem tosa nógv, men teir siga ikki so skrekkiliga nógv. Um hetta er tónleikur sum føroyingar fara at taka til sín er ilt at meta um, men eitt nú hevur lagi› Get Naked veri› at hoyrt í útvarpinum. Alt í alt er henda útgávan meiri ein spurningur um attitude, heldur enn naka› anna›. Men hon rokkar.

Søren Sko



Shine

Søren Sko sum er annar av monnunum aftan fyri kenda bólkin Sko/Torp, sum var nógv at hoyra fyri nøkrum árum sí›ani, er nú klárur vi› síni næstu fløgu sí›ani Sko/Torp fóru hvør til sín.

Um ta› er naka› slag av tónleiki sum kann kallast sofa soul, so má tónleikurin hjá Søren Sko vera umfata›ur av hesi vørul‡sing. Løgini flyta ikki beinlei›is fjøll, her er ta› hondverki› sum dregur ta› tunga lessi›. Ta› er at gera Søren Sko órætt at siga at talan bara er um soul tónleik. Bæ›i popp tónleikur og R&B eru eisini umbo›a›i, og skal man trúgva Søren Sko sjálvum, so er hann innast inni ein poppari.

Tónleikurin er producera›ur til minstu detalju, alt hongur saman og einki er yvirlati› til tilvildina. Ta› eru eftir donskum vi›urskiftum rættuliga stór nøvn sum Søren Sko hevur afturat sær á hesi útgávuni, bæ›i sum sangkrirvarar, tónleikarar og framlei›arar. Cutfather & Joe, sum kunnu vísa á samarbei›i vi› bólkar sum Westlife og Five hava havt ein fingur vi› í spælinum, umframt at Andreas Carlsson sum hevur hjálpt Britney Spears og Backstreet Boys vi› løgum, eisini er vi›.

So er spurningurin bara um júst hesi nøvnini eru naka› at rópa upp um, tá talan ikki er er tannáringa popp. Fyrsta stakfløgan av útgávuni, Right Here Waiting, ver›ur í løtuni nógv spæld í donskum útvarpi, sjálvt um vit ikki hava hoyrt naka› serligt til hana her heima. Onnur løg sum eisini uttan iva fara at gera seg galdandi eru duettin millum teir bá›ar Søren Sko og Daniel, har eisini kvinnuligi rapparin Miss Mupuka sleppur framat mikrofonini, Whatever It Takes og fyrsta lagi› Maybe We Could Make It. Trupuleikin er bara at tónleikurin hjá Søren Sko er hoyrdur hundra› fer›ir fyrr, og at Sørin Sko ikki leggur naka› serligt n‡tt afturat.

Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Fótbóltur 2000 er nú at fáa kring landið

Sonhard Føroyameistari

Eftir at hann í meira enn 20 ár hevur verið aktivur í fremstu billardrøðini her heima, kundi Sonhard Johannesen fríggjadagin fyri fyrstu ferð rópa seg føroyameistara



Endiliga. Sonhard Johannesen kann nú loksins rópa seg føroyameistara í einstaklingakappingini í billard

JÁKUP MØRK

Endaumfarið í einstaklingakappingini í billard varð leikt í hølunum hjá Tvøroyrar Klubba fríggjakvøldið.

Innleiðandi umførini vórðu leikt undafarna vikuskifti, og átta leikarar høvdu leikt seg fram til endaumfarið. Býtt varð síðani sundur í tveir bólkar, har tveir teir bestu úr hvørjum bólki ognaðu sær sess í hálvfinalunum.

Úr fyrra bólkinum komu Henrik Pedersen og Max Rasmussen víðari, meðan Sonhard Johannesen og Gullok Svalbard víðari.

Sonhard og Henrik

Tað lagaði seg soleiðis, at Henrik og Sonhard vunnu sínar hálvfinaludystir, og eftir at dysturin um triðja plássið varð leiktur (Max ognaði sær bronsuna), skuldi so finaludysturin leikast.

Leikt varð upp til 300, og eftir at Henrik hevði lagt fyri sum eitt ódnarveður, varð líkt til, at Sonhard enn einaferð skuldi taka til takkar við at vera næstbestur.

Sonhard sjálvur hevði tó eina aðra fatan, og við einum øgilgum háli togaði hann seg upp á liðini á Hendriki, sum tá hevði umleið 240 eygu.

Henrik hevði tó enn ein møguleika, men tá hann hevði møguleika at seta punktum fyri finaluni, kiksaði hann avgerandi skotið. Sonhard slap so aftur framat, og hann megnaði eisini at vinna seg fram um tey 298 eyguni, sum Henrik hevði.

Reglurnar siga tó, at báðir leikarar skulu fáa eins nógvar stoytir, so um Henrik bert megnaði at koppa einari keylu í seinasta stoytinum, kundi hann tryggja sær umdyst.

Soleiðis skuldi tó ikki verða. Stoyturin frá Henrikki var júst ov veikur, og gjørdist endaliga úrslitið sostatt, at Sonhard kundi kalla seg føroyameistara.

Eisini fyri lið

Tað var nú ikki bert í einstaklingakappingini, at tað gekst væl hjá Sonhardi at savna sær nakað av málmi. Í liðkappingini luttekur Sonhard á liðnum hjá Klaksvíkar Klubba, og í liðkappingini í vetur var eingin ivi um, at Klaksvík átti besta liðið.

Leygardagin var so stór veitsla á Tvøroyri, har steypini, sum Føroya Bjór hevði latið, vórðu handa vinnarunum.

Føroyameistari fyri lið gjørdist Klaksvíkar Klubbi. F.v. Niklas Heri Jákupsson, Sonhard Johannesen og Kristian Suni Høgnesen

Europa kámast hjá FCK

Høvuðsstaðarfelagið tapti mánakvøldið móti botnliðnum, OB, og europeiski dreymurin hjá Toda og teimum tykist nú alt meira fjarður

JÁKUP MØRK

Eftir at FCK fyri viku síðani tapti fjórðingsfinaluna í steypakappingini móti AB, varð sagt at nú máttu leikararnir leggja alla orku í til tess at fáa eina endastøðu, sum kundi tryggja europeiska luttøku komandi kappingarár.

Tryggur OB sigur

Skuldi hesin dreymur røkkast, var einki at ivast í, at dysturin móti botnliðnum, OB, skuldi kasta tvey stig av sær.

Soleiðis varð tó ikki, og í veruleikanum var høvuðsstaðarfelagið ongantíð í nær námind einum sigri í Odense týskvøldið. Einans átta minuttir vóru leiktir, tá Michael Hemningsen sendi fríspark beinleiðis í málið til fjónska 1-0 leiðslu.

Eftir hetta hevði OB hópin av møguleikum, men tað var ikki fyrr enn beint fyri hálvleik, at teir megnaðu at økja um leiðsluna, tá Søren Andersen gjørdi sær dælt av eini verjuvillu hjá FCK.

Í seinna hálvleiki royndi FCK at stríða seg inn aftur í dystin, men talan gjørdist ongantíð um nakra serliga vandamikla roynd, og í donsku fjølmiðlunum verður sagt, at OB ikki hevði stórvegis stríð av at tryggja sær stigini seinastu trý korterini.

Todi Jónsson leikti hesu ferð allar 90 minuttirnar uppi í høgru álopssíðu, men eins og restin av liðfeløgunum, fekk føroyski landsliðsleikarin ikki serliga gott skoðsmál eftir dystin.

Munurin øktist

Við tapinum gjørdust møguleikarnir hjá FCK fyri europeiskari luttøku komandi ár alt meira fjarðir.

Skulu Todi og teir sleppa út í Europa, er kravið í minsta lagi eitt fimta pláss, og kanska eitt fjórða pláss. Í løtuni er FCK á áttanda plássinum í superliguni, seks stig aftanfyri Silkeborg og Lyngby, sum eru ájøvn á fjórða plássinum.

Heilt gloymdir er europeiski dreymurin tó ikki. Níggju dystir eru framvegis eftir at leika, og sum úrslitini hava verið seinastu tíðina, er ikki líkt til, at øll liðni áhaldandi taka stig frá hvørjum øðrum.

Tvey leikumfør eru á skránni um páskirnar, og her verður alneyðugt hjá FCK at betra um úrtøkuna.

Komandi dystir

20/4-00
Brøndby-Vejle
AGF-Lyngby
Viborg-Herfølge
AaB-Esbjerg
FCK-Silkeborg
AB-OB

23/4-00
FCK-Vejle
Silkeborg-AB
OB-AaB
Esbjerg-Viborg
Herfølge-AGF
Lyngby-Brøndby

Støðan, danska superligan

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Herfølge	24	13 - 4 - 7	38	35	3	43
2	Brøndby	24	11 - 7 - 6	42	27	15	40
3	AB	24	10 - 8 - 6	37	27	10	38
4	Silkeborg	24	10 - 7 - 7	40	24	16	37
5	Lyngby	24	11 - 4 - 9	38	34	4	37
6	Viborg	24	10 - 6 - 8	36	35	1	36
7	AaB	24	8 - 11 - 5	35	26	9	35
8	FCK	24	9 - 4 - 11	31	26	5	31
9	OB	24	6 - 9 - 9	21	29	-8	27
10	AGF	24	6 - 6 - 12	22	37	-15	24
11	Esbjerg	24	6 - 4 - 14	24	42	-18	22
12	Vejle	24	4 - 10 - 10	26	48	-22	22